VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Gul til stívt andøvsgul av norði og útsynningi, mest skýggjað veður. Um náttina andøvsgul av vestri og útnyrðingi, og regn. Hitin millum 5 og 8 stig



Veðrið Langa fríggjadag:
Andøvsgul upp í ein Andøvsgul upp í ein strúk, 8-13 m/s, sum veksur til hvassan vind, umleið 15 m/s. Ælaveður, sum um kvøldið og náttina verður til vátakava ella kava. Hitin fellir til millum frostmarkið og 3 stig.



Veðrið páskaaftan og páskadag:
Andøvsgul upp í ein strúk, sum minkar til lot til andøvsgul. Mest skýggjað veður við kavaælingi. Kalt niður í millum 2 kuldastig og 3 hitastig. Lot av norði. Turt veður við sólglóttum. Seinni lot til andøvsgul av suðuri, skýggjað og samdrigið og kanska fer at regna. Hitin til 4 til 7 stig

Norröna handað OM Ships

Týskvøldið var hátíðarhald umborð á gomlu Norrönu, sum liggur við bryggju í Keypmannahavn í sambandi við, at »Operation Mobilisation Ships« endaliga hevur tikið yvir skipið

SKIPASØLA
Símun J. Hansen

Týsdagin var stór móttøka umborð á gomlu Norrønu, Norrönu I, í samband við at skipið verður selt OM Ships.

Longu seinnapartin var høvi hjá fólki at fáa eina rundvísing umborð á skipinum. Fólk frá OM greiddu frá, hvussu komandi »Logos Hope« fer at síggja út, og summar av umvælingunum tykjast vera rættiliga umfatandi. Millum annað verður bildekkið býtt upp í tvær hæddir, har ovara hæddin verður bókasøla og tann niðara goymsluhøli. Nógv umvælingararbeiði verður eisini gjørt aðrastaðni á skipinum. Kahúttir skulu gerast størri, skúli skal byggjast á sóldekkinum, stórt hol skal skerast á síðuna av skipinum til av og áskipan og so framvegis. Á tíðindafundinum vóru bæði umboð fyri Smyril Line og OM Ships. Á myndini síggjast Óli Hammer og Bernt Gulker taka lógvatak.

Teir standa saman við fólki frá Smyril Line og OM. George Verwer, sum stovnaði OM, er nummar 4 frá høgru.

Á samkomuni um kvøldið var nógv ymiskt á skránni. Litið varð aftur í søgu OM, og sagt varð frá, hvussu keypið av Norrønu varð fingið í lag. Tey trý umboðini frá Smyril Line, Óli Hammer, Jóannes á Váli og Klæmint Weihe fingu gávur handaðar frá leiðsluni í OM og søgdu eisini frá teirra søgu um skipasøluna.

Nøkur føroysk ungfólk høvdu skipað fyri felagssanginum og framførdu eisini við Árna Jensen, skipara umborð á Doulos, á odda ein sang.

Aftaná var ein drekkamuður at fáa, og høvi var hjá teimum gott og væl 400 fólkunum, sum vóru komin ymsa staðni frá í heiminum, at fáa eitt prát.

Á tíðindafundinum vóru bæði umboð fyri Smyril Line og OM Ships. Óli Hammer og Bernt Gulker taka lógvatak. Teir standa saman við fólki frá Smyril Line og OM. George Verwer, sum stovnaði OM, er nummar 4 frá høgru
Mynd: Símun J. Hansen

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷10
Nuuk	÷5
Qaqortoq	0
Ammassalik	÷3
Saint John's	5
Halifax	1
Reykjavík	2
Seyðisfjørður	4
Tórshavn	7
Lerwick	6
Aberdeen	9
London	10
Tromsø	8
Bergen	4
Oslo	–
Stokkhólm	8
Keypmannah.	7
Helsinki	5
Moskva	9
Berlin	9
Warzawa	11
Kiev	11
Bukarest	15
Paris	10
Madrid	18
Róm	16
Malorca	18
Athen	18
Malta	17
Tunis	19
Beijing	13
New Dehli	36
Bangkok	36
Jakarta	31
Sydney	24
New York	4
Miami	20
Los Angeles	17
Meksikobýur	21
Panama	–
La Paz	12
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	29

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt hátrýst vestan fyri bretsku oyggjarnar stendur í stað og fer úm vikuskiftið í ein útsynning. Í dag ferðast eitt minni lágtrýst úr Grønlandi til Íslands og víðari hendanvegin



Lágtrýstið grynnist, ein kuldabrúgv tekur seg upp og kemur hendavegin. Sunnudagin kemur eitt lágtrýst av útsynningi móti Íslandi og tilhoyrandi hitabrúgv nærkast Føroyum

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 06/04 kl. 06⁰⁰– 07/04 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,7°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,2 mm – mált frá 06/04 kl. 06⁰⁰–07/04 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í apríl: 11,8 mm



VESTFALLSKYRRINDI

5. apríl: Fullmáni
8. apríl: Mánin næstur jørðini
12. apríl: Seijnna kvarter

Kelda: Almanakkin 2004

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
8. apr	09.36	22.04	08.36	21.04	08.51	21.19	11.36	—	00.14	12.36	07.51	20.19	06.51	19.19	09.51	22.19	10.51	23.19	09.21	21.49	10.36	23.04
9. apr	10.33	23.03	09.33	22.03	09.48	22.18	00.04	12.33	01.04	13.33	08.48	21.18	07.48	20.18	10.48	23.18	11.48	—	10.18	22.48	11.33	—
10. apr	11.33	—	10.33	23.03	10.48	23.18	01.03	13.33	02.03	14.33	09.48	22.18	08.48	21.18	11.48	—	00.18	12.48	11.18	23.48	00.03	12.33
11. apr	00.03	12.34	11.34	—	11.49	—	02.03	14.34	03.03	15.34	10.49	23.33	09.49	22.33	00.18	12.49	01.18	13.49	—	12.19	01.03	13.34